## Fundur í Miðlahúsinum: Hvussu handfara vit búskaparligu framtíð Føroya?

Stígur í alheiminum - vantandi tilbúgving – hvør er frægasta farleiðin. Hvussu handfara vit fíggjar- og búskaparligu framtíðina– metingar, útlit, vánir og ráð. Hesir spurningar verða viðgjørdir á stórum fundi í Miðlahúsinum týskvøldið kl. 19.30, sum Tjóðveldi skipar fyri. Luttakarar verða Jørn Astrup Hansen, formaður í Búskaparráðnum, Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og tingmaður, Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, og Sonja Jógvansdóttir, samskipari í Samtak. Uni Arge undirhaldir, og Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur stjórnar fundinum.




# Nøgdin veksur – prísurin lækkar

**Laksa- og sílaútflutningurin nærkast 40.000 tonsum fyri árið í ár, men prísurin er einki serligur í løtuni. Nøgdin verður størri komandi ár, men prísurin fer helst at lække enn meiri, sigur Ragnar Joensen, formaður í Havbúnaðarfelagnum**

ALIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað gongur væl í alivinnuni í løtuni.

Útflutningurin fer at tátta í 40.000 tons, og siga vit, at meðalprísurin verður 24 krónur kilo, svarar hetta til eitt útflutningsvirði á knappa milliard, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.

Hann sigur, at útlitini fyri komandi ár er meðal.

Noreg økir sína framleiðslu í stóran mun, meðan kilenar hava stórar trupulleikar vi sínari framleiðslu, sum minkar í eins stóran mun.

Spurningurin er bara, um vit megna at koma inn har, sum kilenar hava havt sín marknað. Men fíggjarkreppan ger eisini, at keypararnir verða færri, og tað kann so aftur trýsta prísin niður, sigur Ragnar Joensen.

Gongdin í alivinnuni hevur annars verið hon, at fram til 2005 gekk niður á bakka við nøgdunum, men síðani er vend komin í, at frá 2005 av er nøgdin av alifiski vaksin. Og hon kemur væntandi upp á 45.000 tons fyri komandi ár.

Eg vænti, at fyrra hálvár 2009 verður hampiligt, men at vit fara at síggja eitt fall í prísunum seinna hálvár. So útflutningsvirðið verður helst tað sama sum í ár, sjálvt um nøgdin økist við 5.000 tonsum, sigur Ragnar Joensen.

### Ikki gott í løtuni

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag sigur, at árið í ár hevur roynst sera væl higartil, men at prísurin kortini beint nú ikki er góður.

Prísurin er niðri á ella enntá kanska undir framleiðslukostnaðinum í løtuni, so tað kundi sjálvandi verið betri. Hinvegin hevur árið sum so roynst væl í alivinnuni, sigur Ragnar Joensen.

Eitt annað, sum ávirkar føroyska útflutningin negativt er lága virðið á norsku krónuni.

Kilenar hava havt ein stóran marknað í USA, men vit hava ikki framleiðsluna at koma inn á tan marknaðin.

Tað er fyrst og fremst fryst fløk, sum amerikanarar hava keypt frá kilenum, og ta framleiðsluna hava vit ikki, sigur Ragnar Joensen.

Men framleiðslan gongur væl, og sum longu nevnt verður hon væntandi økt upp í 45.000 tons komandi ár.

Tað verða nógv fólk í starvi í alivinnuni frameftir, men fortjenastan økist ikki. Útlitini eru kortini hampilig fyri komandi ár, tó at roknast kann við, at prísurin fer at falla, kanska serliga tá vit koma út í seinna hálvár 2009, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.



*Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag*

# Temadag fyri alivinnuna

**Føroya Banki skipaði í síðstu viku fyri temadegi fyri alikundunum hjá bankannum**

TEMADAGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað sær rættiliga skilagott út í alivinnuni.

Tað sigur John Rajani frá Føroya Banka, sum skipaði fyri einum temadegi í síðstu viku, har ein norskur serfrøðingur greiddi frá altjóða alivinnuni.

Talan er um ein aliana-lytikara, sum hevði eina framløgu, har hann gjøgnumgekk alivinnuna á altjóða støði.

Víst var á, at Kili hevur nógv ar sjúkur at dragast við, og at framleiðslan tí minkar har, meðan hon er í stórum vøkstri í Noregi. Tosað varð um vánirnar fyri komandi ári, eisini við atliti til fíggjarkreppuna, sum eisini ávirkar prísirnar á alifiski.

Alt í alt sær ikki so galið út, tó at tað er trupult at meta um, hvussu árið komandi fer at roynast.



*Komandi ár sær ikki so galið út, meta Føroya Banki og hansara alikundar*